# Verkætlan fyri Visit Vágar

Visit Vágar og kommunurnar í Vágum leita eftir dugnaligum fólki at gera ferðavinnuætlan fyri Vágar og Mykines.

Endamálið við verkætlanini er at bøta um og framtíðartryggja ferðavinnuna í økinum. Harumframt er endamálið við verkætlanini at tryggja, at fólk á økinum kenna seg væl í heimstaðnum, við atliti til náttúruna.

Visit Vágar kann veita skrivstovupláss til teirra, sum fáa uppgávuna.

**Uppgávan er at**

- Gera menningarætlan fyri ferðavinnuna í Vágum.
- Gera langtíðarætlan, har dentur verður lagdur á nýskapandi ferðamál og burðardygd.
- Økja um møguleikarnar hjá ferðavinnuni at fáa úrtøku av sínari vinnu.
- Leggja dent á serligar náttúrupplivingar
- Seta upp eina stutttíðarætlan fyri, hvussu vit kunnu bøta um ferðavinnuna í Vágum og Mykinesi.

**Krøv og upplýsingar annars**

Visit Vágar ynskir at tilboðið inniheldur eina lýsing av, hvussu ætlanin er at loysa uppgávuna, hvussu ætlanin er at skipa arbeiðið umframt prís og tíðarætlan fyri verkætlanina.

Tey, sum bjóða upp á uppgávuna, skulu greiða frá relevantum úbúgvingum hjá teimum sum skulu gera arbeiðið, og frá møguligum royndum innan ferðavinnu.

Arbeiðið við verkætlanini skal vera liðugt seinast tann 1. september 2020.

**Vekting**

Avgerðin um, hvør fær uppgávuna, verður grundað á eina heildarmeting við denti á, hvør best verður mett/ur at kunna loysa endamálið við verkætlanini saman við samlaða kostnaðinum av verkætlanini. Visit Vágar tilskilar sær rætt til ikki at velja nakað av innkomnum uppskotunum, um mett verður, at einki av uppskotunum lýkur krøvini.

**Vilt tú vita meira um verkætlanina**

So ert tú vælkomin at venda tær til Michael Koba, á tlf. +298 591011 ella á chairman@visitvagar.fo

**Umsókn**

Tilboð við viðkomandi tilfari skal sendast við telduposti til chairman@visitvagar.fo í seinasta lagi 30.03.2020